

Stjórin fyri ONS, fyrrverandi borgarstjórin í Stavanger, vónar, at føroyingar verða við aftur, tá ONS verður í 2016. Her vitjar hann á føroyska básinum nøkur ár herfyri. Mynd Jan Müller/oljan.fo

# Oljumessa aftur í Stavanger í 2016

**Jan Müller**

16.04.2015 - 10:56

Oljan.fo

Herfyri boðaðu stigtakararnir til eitt av heimsins størstu oljumessutiltøkum, “ONS” í Stavanger, frá, at einki tiltak verður í ár vegna ov lítlan áhuga. Fleiri lesarar hava fatað hesi tíðini sum, at eingin oljumessa verður í Stavanger í 2016. Hetta er ikki so. Stóra altjóða oljumessan og ráðstevnan ONS, sum er annaðhvørt ár, verður hildin aftur í 2016. Tann messan, sum er vorðin avlýst, er tann minna ONS, ið skuldi vera í ár og sum burturav er fyri norskar veitarar. Tann stóra messan er fyri veitarar og oljufeløg úr øllum heiminum. Tað er hesa messu, sum føroyskar fyritøkur trúliga hava luttikið á í skjótt 25 ár. Og føroysk luttøka verður aftur komandi ár veit oljan.fo at siga frá Oljuvinnufelagnum, sum tekur sær av fyrireikingini.

Annars stendur altjóða oljumessan “Offshore Europe” í Aberdeen næst fyri. Hon verður í døgunum 8. til 11. september, og eisini hana fyriskipar Oljuvinnufelagið.